Kommunurnar skulu rá›a meira

Ta› er í fullum samsvari bæ›i vi› grundlóg og st‡risskipanarlóg, tá ta› vi› lóggávuni ver›a ásettir karmar fyri kommunalum uppgávum, sigur løgma›ur m.a. í svari til fyrispurning

POLITISKUR FYRISPURNINGUR
Ólavur í Beiti

He›in Mortensen setti Anfinn Kallsberg, løgmanni, fyrispurning og spyr, hvat mark heldur løgma›ur, at grundlógin og st‡risskipanarlógin seta fyri uppílegging frá landsins sí›u í vi›urskiftini hjá kommunum? Eru fyrilit tikin fyri tí Europeiska sáttmálanum um lokalt sjálvræ›i, tá vi›víkur kommunuálitinum, kommunulógini, kommunuvallógini, íløgumarkinum hjá kommunum og eftirlitinum vi› kommunum?

Í rættiliga drúgva svarinum, sigur løgma›ur m.a., at tey vi›urskifti, sum sambært grundlógini ver›a løgd til kommunurnar at st‡ra, eru ikki bara vi›víkjandi teim vanligu – upprunaligu – felags vi›urskiftunum í kommununi, men eisini a›rar ítøkiligar uppgávur, sum sambært lóggávuni eru lagdar til kommunurnar at taka sær av.

Rættur og skylda

Og ví›ari svarar løgma›ur, at í kommunala sjálvræ›inum liggur sostatt ikki bara ein rættur til at st‡ra ávísum egnum vi›urskiftum, men eisini ein skylda til at taka sær av ávísum ø›rum uppgávum, sum ver›a latnar kommunum upp í hendi at umsita. Í tann mun, uppgávan er løgd út til kommunurnar, ver›a ta› tí einstøku – av borgarunum valdu – kommunust‡rini, sum innan karmarnar í lóggávuni koma at gera ítøkiligu tillagingarnar av lógarendamálinum og hava ábyrgdina av lokalu almennu uppgávunum.

– Ta› er tí í fullum samsvari bæ›i vi› grundlóg og st‡risskipanarlóg, tá ta› vi› lóggávuni ver›a ásettir karmar fyri kommunalum uppgávum. Løgfrø›iliga kunnu karmarnar fyri kommunalum sjálvræ›i ikki sigast at vera ov trongir. Politiskt er ætlanin at ví›ka karmarnar fyri tí kommunala sjálvræ›inum, sigur Anfinn Kallsberg.

L‡kur treytirnar
Og vi›víkjandi seinna spurninginum, sigur løgma›ur, at tá danska kommunala sjálvræ›i l‡kur tær treytir, sum eru settar í Evropeiska sáttmálanum um lokalt sjálvræ›i, má ni›urstø›an vera, at føroyska kommunala sjálræ›i› eisini l‡kur treytirnar.

– Nú n‡ggja kommunust‡rislógin er samtykt, ver›ur fari› undir arbei›i›, vi› at fáa eitt grei›ari uppgávu- og ábyrgdarb‡ti millum land og kommunur. Í hesum døgum ver›ur settur ein arbei›sbólkur, sum vi› stø›i í kommunuálitinum skal sta›festa og ra›festa øll økir í øllum a›alst‡rum, har ynskiligt er vi› einum grei›ari b‡ti millum land og kommunur.

– Ta› ver›ur galdandi fyri hetta arbei›i›, eins væl og onnur arbei›i av hesum slag, at umbo› fyri kommunurnar luttaka í tí fyrireikandi arbei›inum, leggur løgma›ur afturat í svarinum.

Trølla Pætur konsert í Øravík

Ta› er ikki á hvørjum degi at konsert er í Øravík, men sunnudagin ver›ur annalei›is, tá ver›ur barnakonsert vi› Trølla Pætur. Trølla Pætur er eftir hondini blivi eitt kent trøll sum hevur leika runt alt Føroyaland — og sunnudagin ver›ur ta› so Øravík sum sendur fyri skotinum. Vi› Trølla Pætur ver›ur eisini Omma hansara. Sjálvt um Omma Trølla Pætur er eitt sindur villari enn Trølla Pætur, so er hon eisini fitt og elskar hon eisini øll børn.

Umframt tey bæ›i kemur eisini Brandur Enni at syngja. Brandur kemur at syngja nógvar kendar sangir hjá Kulum Røtum. Sum sagt so ver›ur konsertin sunnudagin kl. 16.00.

Listin hjá Nor›oya Sjálvst‡risfelag

Nor›oya Sjálvst‡risfelag hevur gjørt henda lista til komandi b‡rá›sval:
Ey›un Eltør, landsst‡risma›ur
Karl Heri Joensen, b‡rá›slimur
Jan Gardar, deildarlei›ari
Julius Poulsen, stjóri
Jóanes Bólstein, arbei›sma›ur
Jonny Olsen, arbei›skvinna
Omi Joensen, sjúkrarøktari
Frita Jóhanna Christiansen, HF-næmingur
Andrias Josephsen, timburma›ur
Petur Martin Solmunde, portørur

Oljumálará›harrin Ey›un Elttør stendur fremst á sjálvst‡rislistanum í Klaksvík

Busslei›in eisini til Kollafjar›ar

Nú fer Busslei›in eisini at flyta kollfir›ingar

Men hvar í Kollafir›i ætlar landsst‡risma›urin at leggja tey 2 ste›giplássini og sk‡lini til n‡ggju busslei›ina, vil Jákup Suni Joensen, løgtingsma›ur, hava at vita

POLITISKUR FYRISPURNINGUR
Ólavur í Beiti

Jákup Suni Joensen, løgtingsma›ur, hevur spurt fer›slumálará›harran Bjarna Djurholm, hvar í Kollafir›i tey 2 ste›giplássini og sk‡lini til n‡ggju busslei›ina skulu liggja, sum víst er til í fíggjarlógaruppskotinum 2001.

Jákup Suni Joensen vísur til fíggjarlógaruppskoti› fyri 2001, har ta› stendur at lesa undir trygdartiltøkum, størri ábótum o.a., at tvey ste›gipláss skulu gerast í Kollafir›i til bussar.

Longsta bygd

– Kollafjør›ur er sum kunnugt longsta bygd í Føroyum, einar 8-9 km. Nú er bara eitt busssk‡li til Bygdalei›ir, og ta› liggur vi› Sjógv. Frá n‡ggjárinum koyrir Busslei›in hjá Tórshavnar kommunu eisini til Kollafjar›ar. Væntandi røkkur Busslei›in heilt nor›ur í Sund, og tí er eisini rímiligt, at fleiri sk‡li ver›a gjørd fram vi› vegnum, har bussarnir koyra.

Og Jákup Suni Joensen vónar at landsst‡risma›urin hevur eitt bo› uppá, hvussu játtanin hjá Vinnumálast‡rinum til nevnda endamál vi› busssk‡lum kundi bøtt um tænastustø›i› fyri tey, sum fer›ast vi› bussi millum Kollafjør› og Havnina.

Tekur vi› starvinum í mei



67 ára gamli dómarin, Joen H. Andreassen, skal frá fyrsta mai halda eftirlit vi›, at løgtingi› og landsins fyrisiting halda landsins lógir

Joen H. Andreassen mi›ar eftir at taka vi› søguliga álitisstarvinum sum løgtingsins umbo›sma›ur í mai 2001

N†GGJUR KÆRUSTOVNUR
John Johannessen

Løgtingi› samtykti í gjár at seta Joen H. Andreassen, dómara, í starv sum fyrsti løgtingsins umbo›sma›ur í søguni.

Joen H. Andreassen arbei›ir í løtuni sum dómari vi› Føroya Rætt, og tískil fær hann ikki tiki› vi› n‡ggja starvinum beinan vegin

– Eg havi eina uppsagnartí› á tríggjar mána›ir, og eg havi enn ikki bi›i› um at ver›a loystur úr dómarastarvinum. Men eg mi›i eftir at náa ta›, so eg kann taka vi› starvinum sum løgtingsins umbo›sma›ur 1. mai næsta ár, sigur Joen H. Andreassen.

Álitisstarv

Ta› fylgir stór ábyrgd vi› starvinum sum løgtingsins umbo›sma›ur. Talan er um eitt starv, sum í høvu›sheitum sn‡r seg um at hava eftirlit vi› allari fyrisitingini í Føroyum. Løgtingsins umbo›sma›ur skal í roynd og veru virka sum ein kærustovnur hjá einstaka borgaranum mótvegis politisku skipanini og fyrisitingini.

Joen H. Andreassen er enn ikki heilt grei›ur yvir, hvørjar uppgávurnar í hesum sambandi fara at ver›a, men hann hugsar sær, at arbei›i› fer at líkjast arbei›inum hjá Fólkatingsins umbo›smanni

Sí›ani vit fingu n‡ggju st‡risskipanarlógina hava vit fleiri fer›ir uppliva›, at kanningarstjórar eru settir at kanna embætisførsluna hjá landsst‡rismonnum, tí ivasamt hevur veri›, um landsst‡rismenninir hava broti› landsins lógir.

Um vit fara at sleppa undan hesum mongu kanningarstjórunum, nú vit fáa ein løgtingsins umbo›smann at hava eftirlit vi› fyrisitingini, veit Joen H. Andreassen ikki.

– Eg má fyrst kanna nærri hvar mørkini liggja millum ymisku stovnarnar og hvørjar heimildir eg havi, sigur n‡útnevndi løgtingsins umbo›sma›ur.

Drúgvar royndir

Joen H. Andreassen er væl egna›ur til starvi› sum løgtingsins umbo›sma›ur. Hann er útbúgvin løgfrø›ingur og hevur drúgvar royndir sum dómari í Føroya Rætti.

Joen H. Andreassen er 67 ára gamal, men í lógini um løgtingsins umbo›smann er einki aldursmark. Lógin sigur bert, at umbo›sma›urin so vítt gjørligt skal vera útbúgvin løgfrø›ingur.

N‡útnevndi umbo›sma›urin er í løtuni staddur á Keypmannahavn á árligu dómarará›stevnuni.

Samgongan samd um sjálvst‡ri

Eftir drúgt fundarvirksemi seinstu dagarnar letur til, at flokkarnir í samgonguni eru vor›nir samdir um ein n‡ggjan leist til føroyskt fullveldi

SJÁLVST†RI
John Johannessen

Samgongulimir eru komnir væl ávegis til eina semju um eina hóvliga gongd fram móti fullveldinum.

Hetta frætta vit frá samgongulimum eftir nógva fundarvirksemi›, i› hevur veri› bæ›i innanh‡sis í flokkunum og millum flokkarnar í samgonguni seinastu dagarnar. Drúgva fundarvirksemi› tykist hava bori› frukt. Samgongan bo›a›i fyrrapartin í gjár frá, at landsst‡ri› fór at halda tí›indafund um ætlanir landsst‡risins í sjálvst‡rismálinum í gjár klokkan f‡ra. Hetta er eftir at dagsins Sosialurin var› prenta›ur.

Seinastu dagarnar hava ábendingar veri› um, at samgongan møguliga fór at slitna, og Fólkaflokkurin hevur dúgliga fríggja› til Javna›arflokkin. Men forma›urin í Javna›arflokkinum, Jóannes Eidesgaard, hevur eingi bo› fingi› frá Fólkaflokkinum um at

– Ta› kann hugsast, at útmeldingarnar frá Fólkaflokkinum hava veri› ein máti at fáa Tjó›veldisflokkin á gli›, seg›i Jóannes Eidesggard vi› útvarpi› fyrradagin.

Hetta tykist eisini vera rætt, tí sum vit skilja á samgongulimum, eru partarnir um at semjast um eina ætlan, har fullveldi liggur einafer› frammi í tí›ini.

Løgma›ur fer í dag at halda tí›indafund um n‡ggja leistin í sjálvst‡rismálinum

Tilboð
langa leygardag
÷15 %
av allari vøru
Bert galdandi leygardagin

Línbúðin
Tróndagøta 32 • 100 Tórshavn • Tel. 31 23 85
Sosialurin - 311820